# ATKVØÐUGREIÐSLA TIL BYGDARRÁÐSVALIÐ OG SKÚLASTÝRISVALIÐ Í VESTMANNA KOMMUNU

Val til bygdarráðið og til skúlastýrið verður hildið týsdagin 11. november 2008. Atkvøtt verður í Ítróttarhøllini í Vestmanna frá kl. 10.00 til 20.00, ella so leingi veljarar møta uttan støðg.

**Brævatkvøða**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu greiða brævatkvøðu á kommunuskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð til og við 10. november kl. 16.00.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi, áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar valdagin.

Veljarar, sum vegna sjúku ella vantandi førleika, ikki eru førir fyri at møta á valstaðnum, kunnu velja heima við at boða frá hesum á kommunuskrivstovuni, tlf. 470 110, í seinasta lagi 10. november 2008 kl. 16.00.

**Valkort**
Valkort eru send veljarunum í kommununi. Um onkur, sum heldur seg hava valrætt, ikki hevur fingið valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at seta seg í samband við kommunuskrivstovuna sum skjótast.

Vinarliga havið valkortið við á val.

**Valplakatir**
Loyvt er ikki at seta valplakatir og annað valinum viðvíkjandi á og um valøkið, sum verður roknað frá og við uppkoyringini til parkeringsplássið innanfyri ítróttarhøllina og fram við skúlanum til Gjógvará.

**Valnevndin fyri Vestmanna Kommunu**
Vestmanna, 4. november 2008



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

# Fobiskeið í Suðuroy

## – um nóg nógv tekna seg

Hevur tú onkra fobi – er bangin fyri onkrum ávísum, líkamikið hvørjum – kann tú fáa góða viðgerð og samstundis læra at viðgera teg sjálva/sjálvan.

Skeiðið verður tann 14. og 15. nov. kl. 10 – 16.

Tilmelding á tlf.: 218286

JEGVAN BÆK
AUT. SÁLARFRØÐINGUR
TINGHÚSVEGUR 18
TÓRSHAVN



# VALEVNISLISTI TIL SKÚLASTÝRISVALIÐ Í VESTMANNA

**Hesi eru uppstillað til skúlastýrisvalið í Vestmanna.**

**Ása M Samuelsen,**
Sjúkrarøktarfrøðingur, Vestmanna

**Barbara Brattaberg,**
Tingskrivari, Vestmanna

**Jóngerð Martinsdóttir Nielsen,**
leiðari fyri Barnaverndartænastuna, Vestmanna

**Sóllind á Sondum Olsen,**
Hjálparfólk, Vestmanna

**Valnevndin fyri Vestmanna Kommunu**
Vestmanna, 4. november 2008

## Epileptikarafelag Føroya

Aðalfundurin 2008 verður hildin í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10c, Tórshavn.

**Týsdagin, 2. desember 2008 Kl. 19.00**

Skrá sambært lógum felagsins.

Jóhanna Andreasen, menningarsjúkrarøktarfrøðingur á Psykiatriska deplinum, kemur at tosa um mentalar forðingar.

Kaffi og rísalamand verður eftir fundin.

**Nevndin**



## Høli í miðbýnum til leigu

Hølini Niels Finsensgøta 12 eru til leigu.
Um áhugi er so skriva til:
**P/F Ingibjørg Dam**
Postboks 81
110 Tórshavn
Ella ring 222882.

# BÓNDAVIKUSKIFTI

Bóndafelag Føroya, saman við felagskapum og stovnum innan landbúnaðin, skipar fyri tiltaki fyri bóndur og fólki sum starvast innan føroyska landbúnaðin og/ella fólki við áhuga fyri landbúnaðinum.

**Tiltakið er býtt í tveir pakkar.**

**Pakki 1:**
Fríggjakvøldið byrjar í bowlinghøllini. Síðani verður borðhald á Hotel Føroyum har landsstýrismaðurin hugleiður um landbúnaðarpolitikk komandi árini.

Leygardagurin er stóri temadagurin við framløgum og orðaskifti um ymiskar viðkomandi spurningar og tíðarbær mál.

**Pakki 2:**
Leygarkvøldið endar við veitslu á Hotel Føroyum.

Fyrireikararnir vóna sjálvandi at flestu velja at koma til alt tiltaki, men til ber at velja millum báar pakkarnar ella alt tiltakið.

Tað er ov nóg at kunngera alla skránna í hesi lýsing. Tí verður víst tí til heimasíðu felagsins www.bondi.fo har skáin sæst øll sum hon er. Tey ið ikki hava atgongd til alnótina kunnu fáa skránna við at venda sær til formannin ella MBM.

Tilmelding til tiltaki má vera í góðari tíð ella **í seinasta lagi fríggjadagin 7/11**, kl. 16. Melda til **hjá MBM á tlf. 309026 (Ann)**. Tilmeldingin verður endaliga staðfest tá luttøkugjaldið er goldið á konto felagsins: **6460 – 4281553** viðmerk navn/nøvn á luttakarum.

Vegna fyrireikararnar
**Bóndafelag Føroya**
Formaðurin tlf. 216026

## Tørvar tær vælgjørdan

# TIMBURMANN?

Ring so til **J.T.D. Smíð**
v/Hera Thomsen tlf. 21 93 18

**J.T.D. SMÍÐ**